

## Beinta Poulsen

Hon er búsitandi í Malmø og hevur klædnamerkið Soul Made. Beinta Poulsen greiðir frá, hvørjum hon arbeiðir við í sínari sniðgeving í løtuni, og hvat skal til fyri at vinna fram millum tey mongu merkini, sum bjóða seg fram á marknaðinum.



## Lena live

Lena Anderssen er kent navn bæði her heima og í útlandinum. Hon hevur seinnu árini givið nógvan tónleik út, hevur havt konsertir úti í heimi, og her heima hevur hon vunnið fleiri heiðurslønir. Leygarkvøldið práta vit Lenu Anderssen um tónleikin, og hon fer at spæla live fyri okkum.





## Elin og Tóra

Tær fylgja við í mótaheiminum – bæði heima og burturi – og á bloggum og heimasíðum siga tær sína hugsan. Elin Christiansen, sum hevur ríkið heimasíðuna plagg.fo, og Tóra Højgaard Joensen, sum bloggar á Kvinnu, siga sína hugsan um føroyska sniðgeving og føroyskan móta. Vit spyrja, hvat tær halda, at føroyskir sniðgevarar duga væl, og hvat teir kundu gjørt øðrvísi.



## Frida Poulsen

Filmurin »The Devil Wears Prada« er eitt undirdrívilsi av, hvussu veruleikin er í mótaheiminum – í øllum førum innan sniðgevaraheimin í Italia. Tú arbeiðir hart, fært lítla løn og nógvir høvuðssniðgevar eru sera órimiligir í krøvunum til starvsfólkið. Tað sigur Frida Poulsen, sum hevur lært til sniðgeva í Milano, og sum nú arbeiðir sum freelancesniðgevi har. Herfyri var Frida í Føroyum, og tá fingu vit eitt prát við hana um lívið í italska mótaheiminum.



## Óluva á Lofti

Handilin Sirri selir bert klæði hjá føroyskum sniðgevum. Vit tosa við Óluvu á Lofti, sum rekur handilin, um áhugan fyri føroysku klædnamerkjunum, um hvørji fólk keypi hesi klæði, og um hvussu føroysk klædnaframleiðsla hevur tað í løtuni.





## Juanita og Óluva

Tær hava gingið catwalk úti í heimi, eru avmyndaðar til bløð og heimasíður, og teljast millum fremstu føroysku modellirnar. Juanita Schrøter Holm úr Hvalba og Óluva Johannesen úr Havn greiða frá, hvussu tað er at verða modell, hvørjar stóru avbjóðingarnar eru, og hvussu tað er skula liva upp til krøvini frá mótavinnuni.



## Anders Breinholt

Hann er vertur í satiru-sendingini Natholdet á TV2, og nú er hann komin til Føroya at taka sending upp. Anders Breinholt leggur leiðina fram við á Hvonn, og vit spyrja hann, hvør er størsta klichéin um Føroyar, sum hann hevur fingið váttað á ferðini til Føroya – og hvørja kliché hann hevur fingið avsannað.

Sirri
STEINUM
SOUL MADE
Guðrun & Guðrun
LOFTI MALAN Á LOFTI
bARBARA Í gONGINI

## Mini mótashow

Leygarkvøldið bjóða vit eisini eitt lítið mótashow, har vit vísa nýggj klædnasett hjá føroyskum sniðgevum. Modellir vísa fram klæði hjá Guðrun & Guðrun, Malan á Lofti, Steinum fyri Sirri, Barbara í Gongini og Soul Made.

Kom á Hvonn og lurta

hvonn ★★★★★ LIVE

... ella hoyr alt á Rás2!

Royal hárfríðkan · Coca-Cola · MAKE UP STORE · ATLANTIC AIRWAYS · Carlsberg · 2 Rás títt radio